Borðtennis á Tvøroyri

Kappingarárið í borðtennis er byrjað, og fyrsta kappingin varð hildin í ítróttarhøllini i Trongisvági um vikuskiftið.

Hetta var ein sonevnd opin kapping, har tað einans bleiv spælt í einmannsleiki.

Urslitini voru hesi:

Smápinkur:
1 Rannva Jacobsen, TBF

Pinkur:
1 Rakul Mikkjalsdóttir, TBF
2 Sheila Strøm, TBF
3 Sára Joensen, TBF

Piltar:
1 Gilli Sørensen, TBF
2 Fróði Jensen, TBF
3 Jonhard Ferjá, TBF

Smágentur:
1 Joan Thomassen, TBF
2 Susie Midjord, TBF

Smádreingir:
1 Reidar Luid, TÓR
2 Gunnar í Dali, TBF
3 Sjúrður Ferja, TBF

Gentur:
1 Marin i Dali, TBF
2 Mariann Mikkjalsdóttir, TBF
3 Wivika Strøm, TBF

Dreingir:
1 Ragnar Egilsson, TÓR
2 Sigurd Carlsson, TÓR

Kvinnuunglingar:
1 Anna Thomassen, TBF
2 Vár Hansen, TBF

Mannsunglingar:
1 Rógvi Nolsøe Hansen, TÓR
2 Sjúrður Thorsteinsson, TBF

Menn:
1 Fríði Jensen, TBF
2 Ragnar Nolsøe, TBF
3 Andras Nolsøe, TBF



Hjá smádreingjununumc vann Reidar Luid úr Tór frammanfyri Gunnar í Dali og Sjúrður Ferjá, sum báðir leika fyri TBF

Christian aftur á blettinum

Føroyski landsliðsspælarin hevur skorað meiri enn triðingin av málunum, sum Lyngby higartil hevur fingið

DANMARK 2. DEILD
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Enn hevur hann ikki rættuliga fingið høvi at vísa, hvør dugur er í honum á føroyska landsliðnum. Men í triði bestu deildini í Danmark vísa tølini, at hann er rættuliga vandamikil frammanfyri mótstøðumálið.

Tað er Christian Lamhauge Holst, sum talan er um. Higartil hevur Lyngby fingið 23 mál í landskappingini. Av teimum hevur Christian Holst, sum hann verður nevndur donsku miðlunum, skorað níggju mál.

Í Føroyum er tað týdningarmikið at taka Lamhauge navnið við. Tað er mammu navnið, sum boðar frá ættarbondunum í Føroyum.

Hesa ferð var Lyngby í Skive, og har vunnu gestirnir 3–2. Christian Lamhauge Holst setti hol á í tólvta minutti.

Máltindarnir

Kvinnur

Aukse Vysniaskaite	VB	32	(7)
Ioana Rápa	VÍF	28	(7)
Alina Olaru	StÍF	25	(8)
Simona Dziugyte	Neistin	21	(6)
Rannvá Augustinussen	VB	20	
Gurið Mortensen	VB	19	
Nikolina Eyðbjørnsdóttir	VÍF	19	
Sóley Mikkelsen	VÍF	19	(3)
Annika Ljósstein	Stjørnan	19	(7)
Nicoleta Radu	Søljan	17	(2)
Daiva Tuomaite	VB	17	(4)
Ása Dam á Neystabø	Neistin	16	(3)
Milica Ergic	StÍF	16	(3)
Joan M. Djordjevic	Stjørnan	14	(3)
Katarina Stepanovic	Stjørnan	12	(3)

Menn

Blagoje Buha	Neistin	24	(8)
Dragisa Stojovic	Neistin	22	(1)
Damir Oros	KÍF	22	(9)
Henrik Gerster	H71	21	(8)
Petur Martin Poulsen	KÍF	20	
Hans Áki Dal-Christiansen	Kyndil	20	(8)
Ingi Olsen	VÍF	20	(11)
Halgir D. Olesen	H71	19	(2)
Høgni Klein	Kyndil	15	
Janus Einar Sørensen	Kyndil	15	(1)
Áki Mørk	Neistin	15	(3)
Sámal Joensen	VÍF	15	(3)
Jacob Jónsson	Kyndil	14	
Mihai Marinescu	StÍF	14	
Alexandur Johansen	StÍF	14	(9)

KÍF-Kyndil 25-29 (10-15):

Tvey grøn stig afturat

Kyndil hevur fingið góða byrjan upp á árið, og aftur hetta vikuskiftið gjørdist talan um tvey stig

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað er ikki frítt, at stóru smílini eru komin aftur til Kyndil. Í øllum førum umræður manshondbóltin. Her fekk Kyndil eftir óvanliga langan steðg eitt steyp í fjør, tá liðið vann steypakappingina, og í ár tykist kósin vera sett móti oddinum.

Sunnudagin vitjaði Kyndil í Hoyvíkarhøllini, har KÍF hevur heimavøll, og tað stóð skjótt greitt, at her ætlaðu gestirnir sær at taka alt. Við eyðkenda framfýsna spælinum settu teir grønu seg alt fyri eitt á dystin, og tó at kollfirðingar royndu at halda fast, so gjørdist ikki tað heilt stóra.

Stýrdu ferðini

Kyndil hevði nevnliga alla tiðina tak á støðuni. Eitt skifti í seinna hálvleiki vóru útlit fyri veruligum avsmurningi, men tá Kyndil so slakaði nakað, fekk KÍF høvi til at koma aftur í dystin. Talan mundi eisini blivið um veruligan spenning, tá munurin eitt skifti kom niður í tvey mál, men so setti Kyndil endaspurtin ígongd, og tá var ikki stórt meira at gera.

Kyndil hevur sum sagt fingið eina frálíka byrjan upp á kappingarárið, og at meta eftir dystunum higartil, so eigur liðið at roknast sum ein av favorittunum til gullmerkini. Enn er tó eitt langt kappingarár fyri framman, og talan verður um nógvar styrkisroyndir, áðrenn endaliga útfallið av oddastríðnum liggur fast. Komandi vikuskiftið hava mansliðini frí, tá landsliðið upptekur skránna, men eftir hetta verður talan um satt brak. Tá skal Kyndil á vitjan í Vestmanna, og tað plagar í øllum førum at borga fyri góðum undirhaldi.

Kollfirðingar tykjast fyri fyrst muga smyrja seg við, at teirra leiklutur aftur verður sum tann bleyt millumvøran. Onkran vørrin munnu teir tó fara at gera, og møguliga verður talan um ein slíkan, tá teir um tvær vikur skulu royna seg móti Neisatnum.

Dysturin í tølum

KÍF-Kyndil 25-29 (10-15)
Málskjúttar
KÍF: Damir Oros 8(2), Petur Martin Poulsen 7, Regin Petersen 4, Kristian Madsen 3, Rógvi Weihe 1, Finn Heri Johannesen 1
Kyndil: Hans Áki Dal-Christiansen 7(3), Janus Einar Sørensen 6, Høgni Klein 6, Jacob Jónsson 3, Ken Zachariasen 2
Brotskøst: KÍF 4, Kyndil 3
Útvísingar: KÍF 1, Kyndil 4
Dómarar úr Tjaldri: Trúgvi Mortensen & Kári Hansen

Hondbóltsstøður

1. deild kvinnur

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 VB	4	4	-	0	-	0	108	63	45	8
2 VÍF	4	3	-	0	-	1	93	83	10	6
3 Neistin	3	2	-	0	-	1	83	58	25	4
4 Stjørnan	3	1	-	1	-	1	71	60	11	3
5 StÍF	3	1	-	1	-	1	65	71	-6	3
6 Søljan	3	0	-	0	-	3	46	73	-27	0
7 Kyndil	4	0	-	0	-	4	52	110	-58	0

1. deild menn

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Neistin	3	2	-	1	-	0	88	76	12	5
2 Kyndil	3	2	-	1	-	0	87	81	6 5	
3 StÍF	3	2	-	0	-	1	73	67	6	4
4 VÍF	3	1	-	0	-	2	73	71	2	2
5 KÍF	3	1	-	0	-	2	75	81	-6	2
6 H71	3	0	-	0	-	3	72	92	-20	0

Eyguni vend ímóti venjaranum

Partick Thistle tapti enn eina ferð, og tað hevði í vikuskiftinum við sær, at formaðurin kendi seg noyddan til at undirstrika, at nevndin hevur álit á venjaranum

SKOTLAND
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Tað gongur illa. Bæði hjá Partick Thistle og Jákupi Mikkelsen. Partick Thistle hevur eftir tíggju tey fyrstu umførini framvegis fyrsta sigurin í skotsku kappingini til góða, og teir eru nógv aftastir. Partick Thistle hevur tvey stig, og Aberdeen er næstaftast við sjey stigum.

Jákup Mikkelsen misti plássið millum stólparnar, tá ið hann var sjúkur í eina viku fyri einum mánaði síðani, og hann hevur ikki fingið møguleikan síðani. Heldur ikki sjálvt um nógv mál eru farin ígjøgnum hjá alt annað enn tryggu verjuni.

Jákup Mikkelsen noyðist framhaldandi at sita á beinkinum í Partick Thistle, men fyribils hevur hetta so ikki broytt stórvegis um úrtøkuna hjá liðnum

Leygardagin tapti Partick Thistle 4–1 á heimavølli ímóti Hearts, sum er á triðja plássinum. Støðan í steðginum var 3–0 til gestirnar. Teir skoraðu í 13., 27. og í 30. minutti. Síðsta málið í 1. hálvleiki fingu teir eftir hornaspark. Heimaliðið minkaði um munin, men so svaraði Hearts aftur, og so var einki at gera.

Eftir tapið undirstrikaði formaðurin í felagnum, Tom Hughes, fyri pressuni, at hann og nevndin hava fult álit á venjaranum, Gerry Collins, sjálvt um tað ikki enn hevur eydnast at vinna. Spurningurin er so, hvussu nógv tað skal leggjast í álitisváttanina. Tað hevur ofta verið at sæð áður, at eitt er, hvat verður sagt ein dag, og eitt annað er, hvat nevndin ger av at gera tann næsta dagin.

Málverjin, sum heldur Jákupi Mikkelsen á beinkinum, eitur Kenny Arthur. Hann kendi í síðstu viku trongd til at markera seg sjálvan. Málverjin segði seg avgjørt rokna við, at Partick Thistle skjótt fór at koma fyri seg. Hann vísti á, at í seks av dystunum hevur tapið bara verið við einum máli. Og so segði hann seg sjálvan at vera so væl fyri, sum hann ikki hevði verið í hesum kappingarárinum. Hann segði seg vera eins væl fyri, sum hann var í fjør.

Partick Thistle hevur skift nógvar spælarar út síðani í fjør. Teir vóna, at tað serliga í verjupartinum fer at verða betri skipað, sum tíðin gongur.

Á gáttuni til niðurflyting

Hvørki liði hjá Christian Høgna Jacobsen ella hja Jann Inga Petersen er í serliga góðari støðu

DANMARK 1. DEILD
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Tað sær einki serliga ljóst út. Vejle við Christian Høgna Jacobsen sum føstum manni ímillum teir fyrstu ellivu ríður um niðurflytingar strikuna, og tað ger Fremad Amager við Jann Inga Petersen eisini.

Fyri aðru ferð var Jann Ingi Petersen á liðnum hjá Fremad Amager, og eisini hesa ferð endaði tað við tapi. Tað kendist sum stórt vónbrot, tí mótstøðuliðið var Brønshøj, sum undan hesum umfarinum var einsamalt í botninum. Brønshøj vann 4–3, og umframt á máltalvuni so sveið tað eisini manningarliga. Fremad Amager fekk eina útvísing ímóti sær í 41. minutti. Allan 2. hálvleik spældu teir við tíggju monnum, og í síðstu løtu mistu teir ein afturat. Jann Ingi Petersen, sum var á vøllinum fyrstu 50 minuttirnar, var hvørki millum málskjúttarnar ella útvístu menninar hjá Fremad Amager.

Vejle hevur altíð verið størri felag enn Horsens, og Vejle hevur altíð átt betri fórbóltsfelag enn grannarnir. Nú er vent í holuni. Tá við Horsens sunnudagin vitjaði í Nørreskóginum, vóru teir favorittar, og teir livdu upp til tað, sum tað varð roknað við, at oddaliðið skuldi megna ímóti Vejle, ið bara er tvey stig frammanfyri Fremad Amager, ið er fjórði aftast. Trý lið flyta beinleiðis niður.

Horsens vann 1–0. Í Vejle høvdu teir gjort nógv fyri at fáa nógvar áskoðarar at taka á við teirra liðið. Tað møttu 3.276 áskoðarar, sum eru fleiri, enn tað møttu til nakran annan dyst í næstbestu deildini. Horsens átti sín part av teimum, og viðhaldsfólkini hjá útiliðnum høvdu alla orsøk at fegnast. Miðskeiðis í 1. hálvleiki stútaðu teir eftir innlegg úr vinstru tað, sum skuldi vísa seg at verða sigursmálið.

Christian Høgni Jacobsen var alla tíðina í Vejle álopinum, men hesa ferð eydnaðist tað ikki hjá honum at skjóta mál. Christian Høgni hevði eina roynd beinanvegin, og hann royndi eisini í 2. hálvleiki, men Horsens við Johan B. Hansen í hópinum helt tætt.

Randers FC helt tørn um næstfremsta plássið, tá ið teir á heimavølli vunnu sannførandi 4–1 sigur á FC Aarhus, sum er aftast, eftir at Brønshøj sigurin á Fremad Amager. Silkeborg er dygst undir uppflytingar plássinum eftir 3–0 heimasigur á Fredericia. Køge snávaði ímóti Skjold, sum vann 4–1, og eftir 2–1 tap á Falster, er B93 á sama stigatali sum Vejle. HFK Sønderjylland misti í toppstríðnum, tá ið teir bara fingu 1–1 á útivølli í Odense ímóti B1913, sum er á niðurflytingarplássi.

Brøndby og FCK fingu enn eina ferð fult

Í kappingini millum tey fremstu var tað bara OB, sum misti, meðan tað í fyrsta umfari einki hjálpti hjá AGF, at teir hósdagin góvu venjaranum sekkin

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Tað gongst væl hjá føroysku feløgunum í superliguni. Brøndby og FCK vunnu bæði sunnudagin. Brøndby er fremst, og FCK er framvegis nummar trý, tí Esbjerg eisini fekk trý stig hesa ferð.

FCK átti heimavøll í Parkini ímóti FC Nordsjælland, sum í tveimum dystum hevði lagt rygg til samantalt 2–12 tap. Hetta hevði fingið miðlarnar at gita, at nú fór FCN venjarin, Christian Andersen, at fáa sekkin. Tað hevur hann ikki enn fingið, og hann fær tað neyvan í hesi vikuni. FCN tapti 2–0 í Parkini, men avrikið hjá gestunum var væl betri enn tað, sum teir hava sýnt tvær tær síðstu ferðirnar.

Málskjúttar hjá FCK vóru álopsspælararnir báðir. Álvaro Santos og Peter Møller hava fingið møguleikan ímillum teir fyrstu ellivu, nú hvørki Todi Jónsson ella Sibusiso Zuma hava verið tøkir. Álvaro setti hol á, eftir at Hjalte Bo Nørregaard hevði spælt hann púra blankan. Hitt málið skoraði Peter Møller, eftir at hann hevði tamt og sneitt seg púra leysan í brotsteiginum. Peter Møller segðist vera so mikið væl upplagdur, at hann varð kosin besti maður á vølli.

Brøndby hevði tað rættuliga stríggið í Glasdaxe Idrætspark, har botnliðið, AB, var væl skipað og helt tætt, inntil tað restaði eitt lítið korter. Tá skoraði svensk Mattias Jonsson einasta málið, og harvið fekk Brøndby øll stigini. Hetta var áttanda ferðin á rað, at AB tapti.

Eftir at teir høvdu fingið nýggjan venjara, hevði Frem vunnið á heimavølli og spælt javnt á útivølli. Hesa ferð høvdu teir heimavøll ímóti Esbjerg, sum er næstfremst. Ebbe Skovdal og hansara menn fingu einki burturúr á heimavølli. Esbjerg vant burturúr teimum og vann 4–0.

Poul Hansen, venjarin hjá AGF, fekk sekkin hósdagin. Tað verður bíðað eftir Sören Åkeby, sum sunnudagin var við til eftir síðsta umfarið í Svoríki at heiðra Djurgården sum meistaraliði. Í dag tekur hann við sum venjari í AGF. Hann hevur mest sum boðað frá, at AGF fer at vinna DM innan trý tey næstu árini. Avrikið í Viborg vísti, at tað er nógv, sum skal rættast upp í AGF, og spurningurin er, um tað fer at bera til bara við tí manningini, sum nú er tøk. Í fjør kundi Morten Poulsen ikki brúkast í AGF. Nú er hann í Viborg, og hann skoraði tvey av teimum fýra málunum í 4–0 heimasigrinum.

Eisini í Ikast vóru nógv mál á skránni, men tað gekk ikki soleiðis, sum FCM venjarin hevði vónað. Hann hevði roknað við, at liðið hjá honum endiliga fór at verða støðugt og tvær ferðir á rað fór at fáa fulla úrtøku. Men tað miseydnaðst. Eftir 35 minuttum var AaB frammanfyri 3–0, og teir høvdu alt spælið. Í seinna umfarinum kom heimaliðið fyri seg. Teir minkaðu um munin til 3–2, og teir høvdu møguleikan at javna, tá ið teir fingu brotsspark, men málverjin hjá AaB bjargaði meistarliga væl.

Leygardagin var OB í Herfølge. Alt bendi leingi á, at gestirnir skuldu fara til hús við øllum stigunum. Teir vóru frammanfyri 2–0, inntil tað restaðu minni enn tjúgu minuttir, men so skoraði Herfølge tvær ferðir, og so endaði tað 2–2. Tað vóru vertirnir glaðari fyri enn gestirnir.